# Fleiri 100 fólk til 100

**Tað vóru fleiri hundrað fólk savnað til móttøku á Føroya Tele fyri løtu síðani, har føðingardagurin hjá Telefonverkinum varð hátíðarhildin**

100 ÁRA DAGUR
*Rólant Waag Dam*

Tónleikur, góður matur og drekka, aftur við røðum frá bæði stjóra, landsstýrismanni og øðrum góðum fólki. Tað var í stuttum skráin á hugnaligu løtuni í Klingruni hjá Føroya Tele í Hoyvík.

Stjórin í Føroya Tele, Andras Róin, legði fyri við at siga nøkur orð. Hann handaði síðani landsstýrismanninum í Vinnumálum, Bjarna Djurholm, eitt føðingardagsrit, sum verður útgivið í samband við 100 ára dagin.

Bókin, sum hevur fingið heitið "Halló", er sermerkt í so máta, at hon hevur sama snið, sum eitt simkort.

Eftir handanina av bókini, fekk ritstjórin sjálvur orðið. Tað var Kári Durhuus, og hann greiddi frá bókini, arbeiðið aftanfyri hana og hvussu hon var samansett.

Síðani hugleiddi Eyðun Andreasen ein løtu, áðrenn føðingardagstiltakið í Klingruni endaði við tónleiki, har fólk fóru gangandi út við hvør sínum eintaki av nýggju bókini, sum tey høvdu fingið ókeypis.



*Nógv fólk var komið saman til móttøkuna í Klingruni - høvuðssætinum hjá Føroya Tele fríggjadagin at hátíðarhalda 100 ára dagin hjá Føroya Tele*
*Mynd: Jens Kristian Vang*






*Kári Durhuus, tíðindamaður hevur ritstjórnað bókina »Halló« í sambandi við 100 ára dagin hjá Føroya Tele*
*Mynd: Jens Kristian Vang*




*Andras Róin, stjóri í Føroya Tele beyð vælkomin. Við árslok leggur hann frá sær sum stjóri eftir 11 ár í heita sessinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*